# Bernharður heiðrast

## – á almennari hugnaløtu

Mánadadagin klokkan 17 verður almenn hugnaløta í Múllers Pakkhúsi í Havn fyri Bernharði Wilkinson, sum fyllir 60 hendan dagin.



60

Og fyrireikararnir siga, at har eru øll vælkomin at heiðra føðingardagsbarnið,

Hesi seinastu árini hevur Bernharður sum fáur sett sín dám á føroyskt tónleikalív og bæði sum dirigentur, tónleikari og fyriskipari hevur hann lyft føroyskan tónleik upp á eitt heilt nýtt støðið.

Hann er føddur og uppvaksin í Manchester, har hann fekk sær tónleikaútbúgving, men flutti ungur til Íslands, har hann livdi og virkaði sum tónleikari í mong ár.

Men sum hálvur føroyingur hevur hann alla tíðina havt samband við føroyskt tónleikalív og varð her javnan. Men serliga síðani hann hann flutti higar fyri nøkrum árum síðani at búseta seg, hevur hann havt ómetaliga stóran týdning í royndunum at menna føroyskan tónleik.

Á hugnaløtuni í Müllers Pakkhúsi verður eyðsæð tónleikur at hoyra og tað verða bæði tónleikarar, sum hann plagdi at stjórna og spæla saman við, ið fara at spæla og somuleiðis fara næmingar í musikkskúlanum at spæla fyri honum.

Høvið verður eisini at bera eina heilsu fram og afturvið øllum verður okkurt lætt og leskiligt at fáa.

# Kristian Blak innstillaður til virðisløn

Kristian Blak tilnevndur Nordisk Råds Musikpris 2011. Í gjár vóru tey 12 tilnevndu til ársins Nordisk Råds Musikpris almannakunngjørd. Ein av hesum er Kristian Blak.

Hann er einasti føroyingur, sum er tilnevndur í ár.

Vinnur hann hesa virðisløn, fær hann eina heiðursløn, ið er áleið 350.000 krónur.



**Pensjónistar ikki ónøgdir**

s3

# Pensjónistarnir eru IKKI nøgdir

Á forsíðini í Sosialinum mikudagin hevði eitt »ó« snikt seg inn í yvirskriftina, sum snúði seg um, hvussu Landsfelag Pensjónistanna hevur móttikið nýggja pensjónsuppskotið.

Ingrid Henriksen, talskvinna hjá pensjónistunum segði við blaðið, at pensjónistarnir ikki eru nøgdir. Tí skuldi yvirskriftin sjálvandi vera, at pensjónistarnir »eru ikki nøgdir«.

Vit biða Ingrid og pensjónistarnar umbera okkum mistakið!

# X Factor á Summar Festival

**TÓNLEIKUR** Ein av ársins finalistum í donsku X Factor kappingini og Basim fara at framføra á Summar Festivalinum í august



Eirikur Lindenskov

Í hesum døgum er X Factor fepurin upp á tað hægsta í Danmark, og nógvir føroyingar fylgja eisini kappingini, har føroyskir sangarar áður hava staðið seg sera væl.

Summar Festivalurin boðar í dag frá, at ein av finalistunum í X Factor kappingini í ár fer at syngja á festivalinum í ár. Summar Festivalurin kann ikki almannakunngera navnið á sangaranum, fyrr enn eftir finaluna um tvær vikur.

Eisini verður ein av undanfarnu finalistunum við á Summar Festivalinum í ár. Basim er ein av X Factor luttakarunum, sum hevur klárað seg best eftir lokna kapping. Basim hevur givið fløgu út, og hann er í løtuni aktuellur við nýggjari stakfløgu, Ta' Mig Tilbage. Basim hevur seinastu tvey árini spælt á stórum festivalum í Danmark, hann hevur fingið vónir um eitt gjøgnumbrot í USA, og hann hevur eisini roynt seg sum sjónvarpsvert til Kids Choice Awards hjá Nickelodeoen rásini.

Lagt er tí upp til eitt ordans X Factor show á Summar Festivalinum, har ein av ársins finalistum og Basim fara at framføra.

# Ljósið er styrki hansara

**FRAMSÝNING** Í sambandi við, at Heðin Kambsdal fyllir 60 í hesummánaðinum, lat Ribarhús upp afturlítandi framsýning við málningum hansara



Dávur Winther

Heðin er útbúgvin lærari og organistur og er eisini kórleiðari. Hann stjórnar Fuglafjarðar Sangkóri, sum møtti upp til løtuna leygardagin, tá ið framsýningin lat upp. Tey sungu tveir sangir og ynsktu honum tillukku við degnum. Sama gjørdu systirsynir hansara Rói og Jonhard Eliasen, sum spældu ferhent klaver.

Frits Johannesen helt eina sera vakra røðu fyri systkinabarni sínum, Heðini. Frits hevði rættiliga tikið tann breiða málsliga pensilin fram og hugleiddi um Heðin og hansara serliga kynstur í málningalistini, sum eingin kundi gera honum eftir – at seta ljósið móti myrkrinum, so málningurin fekk serligt lív.

Frits hugleiddi um ljósrípuna, glæmuna, sólargeislan, mótljósið, glottan, ljósið og enntá norðlýsið – og ikki at forgloyma skuggan, sum uppstóð av øllum hesum, ið gav enn meira lív.

Frits fór víðari og hugleiddi um tað æviga ljósið og kosmos, har alt rann saman í hægri eind – har ljósið spældi sær á helluna og tærin bað Faðir Vár saman við dýpinum, sum Heðin eisini málaði glottar av. Jú, myndatalan var nógv.

Framsýningin av málningum eftir Heðin Kambsdal heldur fram í Ribarhúsi fram til 20. mars